# Summarframsýningin 2008

**»Kanska« er listarliga lyklaorðið á Summarframsýningini 2008, ið verður sett í Norðurlandahúsinum á mentanarnáttini**

LIST
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*




*»Dream« – ein av málningunum, sum listamaðurin Bárður Dal-Christiansen hevur við á Summarframsýningini, 2008*

13 listafólk verða í ár við á Summarframsýningini, sum verður at síggja bæði í Norðurlandahúsinum og í Listaskálanum.

Hesuferð hava listafólkini fingið til uppgávu at taka støði í orðinum »Kanska« í listaverkunum.

### Tað fer tíðin at vísa ...

Um orsøkina til, at ársins kotuorð til listafólkini er »Kanska«, siga fyrireikarnir millum annað, at skjótt skiftandi veðrið hevur meir vald á menniskjum her og meir at siga fyri okkara gerandisdag enn aðrastaðni.

»Tí er tað lítla orðið »Kanska« nærum partur av hvørjari samrøðu. Tí vit vita ongantíð heilt. Vit fáa avtalur í lag, men kortini er tað ikki víst, tað veldst um so nógv. Sum ferðafólk er skjótt at læra, at tað ikki er víst, at flogfarið lendir og fer til ásettu tíð. Kanska, kanska ikki, men tað fer óivað at ganga kortini. Tað fer tíðin at vísa. Tann lítli ótryggleikin í orðinum »Kanska« er næstan ótolandi fyri eitt sera virkið og modernað menniskja, ið helst vil hava skil á øllum. Tí er orðið í sjálvum sær ein avbjóðing,« verður sagt í skrivi um framsýningina.

### Á tveimum støðum

Tað verður landsstýriskvinnan í mentamálum, Kristina Háfoss, sum setir Summarframsýningina í Norðurlandahúsinum í annaðkvøld klokkan 22. Tó letur framsýningin upp í Listaskálanum klokkan 20 sama kvøld.

Framsýningin verður at síggja í Listaskálanum fram til 20. juli og í Norðurlandahúsinum fram til 17. august.

Summarframsýningin í ár hátíðarheldur 25 ára dag Norðurlandahúsins, og at 15 ár eru liðin, síðan Listasavn Føroya lat upp eftir útbyggingina í 1993.

### Luttakandi listafólkini eru:

Bárður Dal-Christiansen - Annika á Lofti - Óluva Johannesen - Beinta av Reyni - Edward Fuglø - Kári Svensson - Philippe Carré - Eyðun av Reyni - Sigrun Gunnarsdóttir - Astri Luihn - Jóna Rasmussen - Amariel Norðoy - Arnold Vegghamar

### Katalog:

Í sambandi við framsýningina er katalog givið út, sum Dagmar Warming, savnsleiðari, MA, hevur skrivað. Katalogið er einar 60 blaðsíður við teksti á føroyskum, enskum og donskum og myndum av listaverkum hjá øllum 13 listafólkunum, ið sýna fram.

Tilboð til mentanarnáttina



Umbro X-Boot 111-A AK HG
Fyrr 1800 kr
Nú 699 kr

P/F THOMAS DAM | INTERSPORT
Glyvrar Tlf.447399
Klaksvík Tlf.455320
Tórshavn Tlf.355300





Vit hava opið mentanarnáttina

Vit hava nógv lekkur undirklæðir!



parfumari Drós

Drós · N. Finsensgøta 12 · Tórshavn
tel 314811 · fax 314877
jmr@kallnet.fo · www.dros.fo

Opið er soleiðis:
mán. - mik. 10.00 -17:30
hós. - fríg. 10.00 -18.00
leygardag 10.00 -14.00